Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 14. juli 2006



**Hattar í Jerusalem (2005 Hats of Jerusalem)**

Í Jerusalem ganga nógv enn undir hatti, hóast hattar annars fóru av móta longu í fimtiárunum. Leikstjórin Nati Adler hevur sett sær fyri at kanna, hvønn týdning hattarnir hava. Ortodoksu jødarnar ganga allir undir hatti, men tað valdast hvønn trúarbólk teir eru limir í. Palestinar greiða frá, hvussu Arafat-mótin vindur uppá seg millum ung, og armenskir munkar ganga undir hatti, sum líkist Ararat fjallinum. Hví hava nakað uppiá høvdinum, og hví skulu kvinnur krógva hárið? Ísraelsk dokumentar frá 2005.

**Mikudag 19. kl. 19.40**



**Amerika hjá Amish-fólkinum**

Amish-fólkið flutti úr Evropa og yvir til USA. Tey hava síðan 1600-talið búð í Pennsylvania og Ohio í einum afturlatnum heimi við egnum lógum. Fronsk dokumentarsending frá 2005.

**Mikudag 19. kl. 19.00**

**De grønne slagtere**

Brøðurnir Bjarne og Svend eru móðir av at træla fyri slaktaran Holger, sum altíð skeldar og háðar teir. Tí fara teir undir egið virki, men kappingin er hørð og viðskiftafólkini fá. Ikki fyrrenn Svend av ymiskum ávum fær hugskotið til vøruna "kyllerylle", sum kan kappast við alt sum Holger hevur at bjóða. Men tað er tungt at fáa rávøru, tí hon er av heilt serligum slag, og so verður Bjarne forelskaður, samstundis sum tvíburabeiggin, sum ikki er heilt frískur at vitja. Danskur filmur frá 2003, óhóskandi fyri smábørn.

**Týsdag 18. kl. 20.45**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**